# FERÐAVINNUSTRATEGI
## FYRI NORÐOYGGJAR









# FERÐAVINNUSTRATEGIIN

Ferðavinnustrategiin er grundað á borgarafundir runt um í Norðoyggjum, fundir við kommunur og ynskir frá ferðavinnuaktørum og er samstundis bygt á ynski um eina ábyrgdarfulla og burðardygga ferðavinnu við fylgjandi útsøgn:

"Einki átak í okkara øki uttanum okkum" sum er grundað á, at tað er umráðandi at vit ikki seta menningarátøk í gongd, uttan at tað er eitt ynski um tað ella tað er góðkent í lokaløkinum.

Grundarsteinurin er føroyska jørðildið – føroyskar siðvenjur og matmentan.

Tað vit bjóða fram byggir á okkara gerandisdag og harvið fær ferðafólkið eina autentiska góðskuuppliving, sum tey fegin rinda nógv fyri.

Vit virða, at tað eru ymisk sjónarhorn í samstørvum – til dømis gongd í haga.

Vit vilja ganga á odda heldur enn at renna aftaná.





# TAÐ SNÝR SEG UM AT MENNA UPPLIVINGAR OG TÆNASTUR Í SERFLOKKI

- Vit hava eitt av størstu økjunum í Føroyum og vit hava sett okkum fyri at øll økir, oyggj, bygd og bý hava nakað at bjóða ferðafólki.
- Øll økir hava nakað serstakt, sum bert eyðkennir tað økið.
- Vit fara í samstarvi við m.a. Íverksetarahúsið at bjóða vitan og førleikamenning, fyri at tryggja bestu góðsku í tí vit bjóða fram.
- Vit fara at hava árligar borgarafundir runt um í Norðoyggjum fyri at tryggja, at vit eru á somu kós og vilja tað sama – við serligum atliti til burðardygd og inntøkuvøkstur.

# FRAMLEIÐSLA AV DYGDARVØRUM

- Vit vilja samstarva við ferðavinnuaktørar um hvussu vit best tryggja, at sum mest liggur eftir, út frá hugburðinum um ferðafólk rinda meiri fyri góðsku heldur enn veksa um nøgd.
- Vit vilja framleiða dygdarvørur, sum vera eftirspurdar av ferðafólki
- Vit vilja tryggja okkum, at ferðafólk sum vitja okkum leggja pening eftir seg – við altíð at hava nakað tey eftirspyrja.





# UPPLIVINGAR Í SERFLOKKI

- Við støði í HEIM strategiini hjá Visit Faroe Islands, fara vit saman við m.ø. Húsarhaldskúla Føroya og lokalum aktørum, at menna framleiðslu av lokalum rávørum.
- Vit hava longu heimablídni og matstovuupplivingar í serflokki og fara at menna hetta økið víðari, soleiðis at vit alt árið kunnu bjóða heimablídni, við støði í føroyskari matmentan og siðvenju.
- Vit hava eina serstaka fiskivinnusøgu og vilja menna upplivingar, sum bjóða okkara ferðafólkum innlit í eina serstaka søgu, sum okkara land er bygt á.

# OKKARA MENTANAR- OG VINNULÍV

- Vit vilja menna mentanar- og tónleikaupplivingar í okkara øki, sum hevur fostrað mætastu tónleikarar í Føroyum.
- Vit vilja menna upplivingar, sum byggja á okkara vinnulív – m.a. Føroya Bjór, sum á burðardyggan hátt framleiðir vørur í heimsklassa
- Vit vilja, saman við lokalum aktørum, menna upplivingar í náttúruni, sum taka atlit til fólk og fæ og samstundis taka hædd fyri sliti á náttúruna.





# TRIVNAÐUR, MENNING OG SAMSKIPAN

- Vit arbeiða fyri trivnaði hjá borgarum, við at skapa upplivingar og samanhald bygt á okkara felags mentanararv – t.d. Jól í gamla Klaksvíkshandlinum.
- Vit samskipa tiltøk saman við kommunu og aktørum í økinum – Norðoyastevnan, jólatiltøk, Closed for maintenance, verkætlanir
- Vit luttaka á ráðstevnum og messum  fyri at nema okkum kunning og skapa meirvirði fyri økið – t.d. Unordinary Meetings, sum er eitt nýtt koncept vit menna fyri Norðoyggjar.

# OKKARA HORNASTEINAR

- Vinnuferðavinna.
  - *ráðstevnu- og fundarvirksemi*
- Cruiseferðavinna.
  - *vit vilja hava fleiri cruiseskip*
- Ferðavinnu upplivingar.
- Kunningarmiðdepil.
- Samskipan av tiltøkum.



# HVUSSU RØKKA VIT MÁLINUM?

- Ein pall har tú finnur alt Norðoyggjar hava at bjóða.
- Ein pall, har tú kann bíleggja og gjalda beinanavegin.
- Ein pall, sum tryggjar, at ferðavinnuaktørar kunnu hava fokus á produktmenning og ikki skulu investera í heimasíðuloysnir í fyrsta umfari.
- Ein pall, sum tryggjar, at tú fær holla kunning um økið.
- Ein pall, sum altíð vísir hvat er á skrá í næstum – eventkalendarin.
- Ein pall, sum altíð er í samstarvi við ferðavinnuaktørar.

# VISIT NORĐOY 2.0

- Eitt nýggjur savnandi grafiskur samleiki, sum umboðar alt økið.
- Ein nýggjur savnandi grafiskur samleiki, sum ger tað lættari hjá ferðafólki at finna okkum.
- Ein nýggjur savnandi grafiskur samleiki, sum vit øll kenna okkum aftur í.
- Ein nýggjur savnandi grafiskur samleiki, sum er nútímans og egin.
- Eitt nýtt heiti, sum er lættari at nýta hjá útlendingum.
- Ein nýggj byrjan.

LOGO

VISIT
NORTH

LOGO

VISIT NORTH

LITIR

TSHIRT



HATTUR



TASKA



ID-KORT




NORTH IS
THE RIGHT WA
TO STAY
HYDRATED

PERMA / LÝSING




VISIT
NORTH
Home
Events
Getting Around
Shop
Welcome To The North
Immerse yourself in the pristine nature, breathtaking surroundings, and diverse cultural richness waiting to be explored.
See our catalog
Upcoming Events
Lorem ipsum dolor sit amet consectetur. Cursus diam vulputate tristique tempor magna non convallis. In vitae at cursus viverra eu sed cursus. Ut fermentum amet arcu tincidunt massa viverra nisl. Non ultrices eros nec consequat amet neque.
MARCH, 2024
02
MAR
CAFÉ QUIZ AT CAFÉ FRÍÐA
quiz

VISITNORTH.FO